

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 11 - 2012

# Skip fáa fráboðanarskyldu í arktiskum øki

Altjóða sjóferðslufelagsskapurin IMO góðkendi í gjár eitt uppskot hjá Noregi og Russlandi um, at skip, sum sigla í Barentshavinum og har um vegirt, skulu hava skyldu til at geva boð frá sær. Tann nýggja fráboðanarskipanin, sum hevur fingið heitið Barents SRS, fer at geva russiskum og norskum myndugleikum betri og meiri nágreiniligan kunnleika um skipaferðsluna í økinum. Hetta fer eisini at gera tað lættari at halda eygað við skipum, sum krevja serliga stóran ans, sigur norska kringvarpi. Skipaferðslan í Barentshavinum og fram við norsku strondini er vaksin nógv tey seinastu árini. Hvønn dag sigla fleiri skip við olju og gassi hendanvegin, og av og á síggjast skip, sum flyta kjarnorkuburturkast til og úr Russlandi. Norski fiskimálaráðharrin, Lisbeth Berg-Hansen, sum eisini umsitur viðurskifti fram við strondini, sigur við NRK, at tann nýggja skipanin fer at bøta um trygdina á teimum norðaru havleiðunum. Sambært norska kringvarpinum er Barents SRS tann fyrsta IMO-góðkenda fráboðanarskipanin, sum ikki krevur, at skip skulu ringja fyri at geva boð frá sær.